Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Annika Olsen, løgtingskvinna

Svarari: Ruth Vang, landsstýriskvinna í fíggjarmálum

Evni: Eftirlit við rúsevnum

Spurningar:

1. Verða øll skip og bátar, sum koma til landið, kannaði gjølla fyri rúsevni?
2. Um nei, hvør er orsøkin til hetta?
3. Hvat skal til av starvfólkaorku og útgerð fyri, at øll skip og bátar verða kannaði?
4. Hvat er status við *Heildarætlanini um at fyribyrgja og tálma rúsevnismisnýtslu í Føroyum 2022-2028* viðvíkjandi teimum tilmælum, ið landsstýriskvinnan varðar av?

Viðmerkingar:
Rúsevni gerast alsamt meiri vanlig í býarlívinum, sum viðføra vandastøður fyri tann einstaka. Saman við mongdunum av rúsevnum í býarlívinum er úrslitið eisini ofta harðskapur, eisini av tí grovara slagnum. Samstundis hoyra vit nærum dagliga í miðlunum um, at hald er lagt á so og so nógv gramm og kilo av hasji, amfetamini v.m. Herfyri varð dómur sagdur í Føroya Rætti fyri fyrstu ferð um rúsevnið 5 F-MDMB-PINACA. Hetta er eitt sterkt rúsevni, sum kann samanberast við kokain og amfetamin. Tað, sum eisini kom fram í málinum var, at tann dømdi eisini hevði eina gasspistól og lóður til hennara umframt knúgvajarn við innbygdari streymbyrsu. Ein kann bara ímynda sær, hvat hetta skal brúkast til, og tað er alt annað enn hugnaligt. Fyri at vita, hvussu vit kunnu hava fullkomið eftirlit við landamørkunum bæði sjóvegis og loftvegis verða hesir spurningar settir.

Á Løgtingi, 28. oktober 2025

Annika Olsen